Deyðamessa fyri tjóðskaparromantikki

Tjóðarbygging er vorðið vanligt orð í føroyskum mentanarkjaki. Men hvat snið skal tjóðarbyggingin hava? Skal hon leggja seg aftrat upplýsing og humanismu ella tjóðskaparromantikki?

TJÓÐSKAPARMENTAN
Bergur Hansen

Føroyska tjóðskaparrørslan gjørdi sær við oðrum orðum eina mynd av tí, ein fatað sum føroyskt. Tað føroyska er tískil eitt søguligt og mentanarligt interpretament. Eitt fólk tolkar seg fram til ein samleika, á sama hátt sum einstaklingurin tolkar sín barndóm. Tolking er eitt rúm við nógvum møguleikum - à la tað er ongantíð ov seint at fáa ein góðan barndóm, sum kátt bagatelliserandi mannavitið sigur - men tað er samstundis ein bundin uppgáva, har søga og sosialur samanhangur hava nógv at siga

Savnsmynd

Seinni partur

Kim Simonsen um føroyska tjóðarbygging

Føroyska røddin á ráðstevnuni var Kim Simonsen, sum lesur heimspeki og bókmentir á Københavns Universitet. Hann er vorðin landskendur í Føroyum sum kritikari av føroyskum tjóðskapi. *Full frontal* og við einum í føroyskum høpi sjáldsomum fráleika og perspektivi hevur hann mótmælt tjóðskaparromantiseringini, folkloriseringini og siðsøgufiseringini av føroyskum mentanarlívi og þortum av føroyskari list. Í staðin fyri tjóðskaparromantiska tjóðarbygging, hevur Kim Simonsen talað fyri einari tjóðarbygging, ið byggir á upplýsing og rationella - ikki nytturationella - hugsan. Við torurødd hevur hann roynt at jarða føroysku tøgnmentanina og mótmælt einsrættingini av føroyskari mentan, har musikarar gera tónleik til eina undirdeild av politikki og har vit sóu týðandi partar av sjálvum 1968-uppreistrinum verða slúktar av tjóðskaparromantikkinum og einum anti-modernaðum hugburði - nakað sum heimspekingurin Jürgen Habermas beinrakið spáddi um longu í byrjanini av hesum uppreistri. Hann sá feilkonstruktiónina.

Tað var hetta sama meira og minni kulturradikalt - t.e. mentanarkritiskt - dœmda sjónarmið sum stjórnaði framløguni hjá Kim Simonsen. Í høvuðsheitum staðfesti hann, at tjóðskaparromantikkurin ikki er eitt farið tíðarskeið í føroyskari mentan. Hon livir framhaldandi m.a. í einum tjóðskaparbargarligum hami. Hetta er ein hugmynd um *Gemeinschaft*, sum lokkar við patriotismu og nœrleika, sum hann tók til. Leitað hevur ikki verið eftir upplýsing fyrst og fremst, men felagsskapi. Ein dreymur um ein mistan felagsskap. Stóð tað til Kim Simonsen var folklorifiserandi og puristiskt tjóðskaparromantikkurin skrottparkeraður fyri langari tíð síðani.

Eitt nýtt álit er komið til Fólkaskúlan bílagt av mentamálaráðharranum Annlis Bjarkhamar - ein ungur landspolitikari sum tykist vera eitt friskt lot inn í føroyskan mentanarpolitikk. Í hesum áliti til Fólkaskúlan finna vit kjarnan í teimum kjak- og upplýsingargreinum, sum Kim Simonsen hevur havt í føroysku bløðunum:

> Her er tað ábyrgdin hjá teimum, sum sita á mentanini og arbeiða innan vísindi, at formidla og bera fram nýggja vitan. Tað er henda milda humanisma, hesin kœrleikin til einstaklingin, eg vóni, at vit koma at finna í føroyska fólkaskúlanum framyvir, men eg eri langt frá sannfordur um hetta mið. Forðingar á leiðini eru nógvar, m.a.:
>
> - Ein fólkslig traditionalisma, ið á besta sokallaða "fólksliga" hátt, vil sleppa at tvíhalda um eina grova fjølmiðlaborna anti-intellektualismu og vil sleppa at undirmeta føroyingin framyvir.
> - Ein smáborgarlig mentanarkonservativ leið, full av andaligum leti, ið vit kunnu kalla "alt er gott, sum tað er", duga tey at rokna, so eru tey vœl sloppin.
> - Ein meira modernaður og vitanarborin vansi finst eisini t.d. eitt postmodernað uppgávulyndi, mótanámsfrøði, ið vil relativisera alla vitan til eitt reint bólkamál um førleikar.
>
> Hinvegin er vandin ein almenn trongskygd jagstran eftir tilvildarligum kunnleika, heldur enn vilji til kjak og veruligt andsfrœlst dannilsi. Mentanarkonservatisman finst í mangum hami í Føroyum í dag. Vit hava bíbliutrúgva afturhaldið, sum berjist við nakrar postmodernaðar neosiðbundnar, meiri ella minni modernaðar føroyingar.

Ektaðar og falskar mytur

Eg skilji til fulnar tørvin á at uppfinna tað føroyska eftir eina langa miðøld, har at siga alt stóð í stað, og eftir at modernaðar tíðir fingu alt, sum ein annars helt standa á hellubotni til at hvørva upp í loft. At uppfinna tað føroyska tekur støði í hugtakinum *konstrukt* ella *konstruktión*. Hesi bœði orðini kunnu vera óheppin, tí tey geva ta fatan, at tað sum er uppfunnið ella konstruerað bert er tilvild og kundi verið hvat sum helst. Helst er hepnari at nýta hugtakið *interpretament*, sum er heintað úr týskari teologi - eitt orð sum tíverri ikki hevur vunnið fótafesti í norðurlondum og sum omaná tað kennist fremmandari enn 'konstruktión'. Interpretament er úrslitið av einari tolking.

Føroyska tjóðskaparrørslan gjørdi sœr við oðrum orðum eina mynd av tí, ein fatað sum føroyskt. Tað *føroyska* er tískil eitt søguligt og mentanarligt interpretament. Eitt fólk tolkar seg fram til ein samleika, á sama hátt sum einstaklingurin tolkar sín barndóm. Tolking er eitt rúm við nógvum møguleikum - à la tað er ongantíð ov seint at fáa ein góðan barndóm, sum kátt bagatelliserandi mannavitið sigur - men tað er samstundis ein bundin uppgáva, har søga og sosialur samanhangur hava nógv at siga.

Trupulleikin er tó ikki fyrst og fremst, hvat hugtak vit bróka til at forklára tað føroyska, men heldur *hvussu* tað føroyska verður fatað í praksis. Tað verður tíverri alt ov ofta lýst og allýst í trongari merking. Í fyrru greinini vórðu donsk dømi nevnd, men dømi eru eisini enn í dag um fýrkantað føroyskt tjóðskaparsinni, sum er vilst inn í nýggja túsundárið: føroyska purisman - ikki at blanda saman við neyðugari málrøkt - útihýsingin av Williami Heinesen úr føroyskari bókmentasøgu, sum blaðmaðurin á Fregnir Carl Jóhan Jensen hevur gjørt seg til talsmann fyri osfr. Tjóðskaparromantikkurin hevur heldur ikki dugað at sœð, at gomlu harmonihugmyndirnar um tað føroyska sum verandi tað bygdaliga við fjallgongu, monnum sum fara á flot osfr. eru avoldaðar og farnar av lagi viðvíkjandi hugsunarháttinum í dag.

Eg eri ikki tann maðurin, sum skiggjar romantikk og mytur, men tað er at siga, at tjóðskaparromantikkur bœði her sum har sum frá leið gjørdist ein følsk myta. Hvat er so ein ektað myta? Heimspekingurin Paul Ricoeur sigur munin millum ektaðu og følsku mytuna vera tann, at tann ektaða mytan er samstundis avmytologiserandi og remytologiserandi, t.e. ger av við mytuna sum trúarímynding og síðan endurvinnur og endurfatar mytuna í nýggjum høpi. Ektaða mytan er við øðrum orðum bœði frígering og bundinskapur. Ricoeur sigur sjálvur um ektaðu mytuna:

> Bert tœr mytur eru ektaðar, sum kunnu endurtolkast gjøgnum frígering. Og eg hugsi her um frígering sum samstundis eitt persónligt og felags fyribrigdi. Vit kunnu kanska skerpa hesa orðing við einans at írokna tœr mytur, ið sum sín sjónarring hava frígeringina av mannaættini sum heild. Frígering er ikki útihýsandi.

Tjóðskaparromantikkur er harafturímóti útihýsandi og reinur bundinskapur. Sonn tjóðarbygging er ikki tjóðskaparromantisk, men upplýsingarhugað. Tjóðskaparromantikkur hevur ikki sansin fyri at síggja verðina ella hug at stoyta saman við verðina, og hann er blindur fyri øllum øðrum enn tí sum er váttandi og í ringasta føri fyri øllum øðrum enn tí, sum pyntar egnan nalva.

Tjóðskaparromantikkur í framkomnum samfeløgum blívur ikki til annað bakrógvin monomentan, og hon er haraftrat obskurantisk í sínum verulagi, tá hon - sum í Bertel Haardersa føri (sí fyrra part av greinini) - er figgindaliga sinna mótvegis kulturradikalismuni og upplýsingartíðini og harvið eisini mótvegis renœssancuhumanismuni. Tjóðskaparromantikkur og tjóðskaparsymbolikkur í framkomnum samfeløgum skal helst ikki umfata stórt meira enn fløgg, drotningar og kongar, fótbólts- og hondbóltslandslið. Móðurmálskensla og staðarkensla eru tilverulig virðir, sum í mínum hugaheimi røkka langt út um grovligan og kitschutan tjóðskaparromantikk.

Guttormur í Múla

Tann felagsmentan í fjølmentaðum og øllum framkomnum samfeløgum strembast skal eftir eigur fyrst og fremst byggja á aðalin í fólkinum. Hesin aðal kann myndast við mildu humanismunni, William Heinesen av mongum at nevna fann í sagnfigurinum Guttormi í Múla (sí tíðarritið Varðin 23/1944). Guttormur í Múla brúkti sína vitan - við var gandkynstur - skynsamiliga og miðvíst. Søgnini hevur hesa rámandi lýsing av honum:

> Ikki nýtti hann kunstur sín til at gera nøkrum manni mein, nógv heldur til at hjálpa.
> Valamaður var hann, frálíkur í ávikum og álitismaður í øllum lutum.

William Heinesen er ein av teimum, sum hevur havt støddina til at síggja aðalin í føroyska fólkinum. Hetta eisini, tá hann sigur um Guttorm í Múla, at hann kanska meiri enn nakar annar lýsir føroyskt sinni og fólkalyndi. Einaferð 1990unum bleiv øskukalt í gamla heimbýli Guttorms, Múli í Borðoynni. Góðar kreftir vildu, at gøtuljósini í Múla framvegis skuldu lýsa í vónini um, at bygdin livnaði aftur. Um lív er komið í aftur í Múla, veit eg ikki. Uttan at eg skal ditta mœr at seta meg undir liðini á hvørki gandakallum ella trøllaklippar-um, so upplivdi eg sjálvur aðalin í føroyska fólkinum - sum so ofta áður í Føroyum og sum so mangur annar skal sigast - tá eg var í Múla miðskeiðis í 1980unum. At hugsa um blíðskapin, ið var og hús sum nú standa tóm, er ein beiskur minnisbiti. Hvussu nógv verri man tað so ikki kennast hjá fólki úr Múla. Men ljósini lýsa vónandi enn í bygdini. Eitt serstakt ljós. Serstakt er eisini tað ljósið - upplýsingin - sum Guttormur í Múla er "latin í" á kendu pastellmyndini hjá Williami frá 1943.

Tað var í tjóðskaparromantiskari tíð, at søgnin um Guttorm í Múla og annar skaldskapur av manna munni var innsavnaður. *Tá* var tjóðskaparromantikkur neyðugur. Í dag verður tann arvur, føroyingar náddu at lofta, áðrenn hann hvarv í gloymskuni, tolkaður. Tað er júst tað William Heinesen ger - og við skili. Tann mildleiki, "humanitetur" og ríkidømi "av andligum slag", sum William í mynd og orðum setur í samband við Guttorm í Múla er ein dynamisk tolking, sum ger gandakallin til eina livandi mytu. Høvuðspersónarnir í sagnum skara framúr sum einstaklingar á ein ella annan hátt. Her møtast William Heinesen og Kim Simonsen, sum í senn tosa um milda humanismu og kœrleika til einstaklingin.

Tað øvugta av hesum er tjóðskaparromantikkur og ynskidreymar hjá útlendingum um einar reinar og eksotiskar Føroyar. William ávarar sjálvur móti tílíkum lýsingum í greinini "Lívið í Føroyum", sum stendur at lesa í ummælissavninum *William ummælir fagrar listir.* Eitt rœðudømi um eina antimodernaða og fjákuta romantiska eksotismu Føroya vegna var ein kronikk hjá Le Klint í danska dagbláðnum *Politiken* fyri stívliga tveimum árum síðani. Le Klint endar við at siga:

> Derude i Nord ligger en lille flok øer i et vindblœst ocean. Endnu taler folket dér i samme tungemål og kommer hinanden ved. Måtte det vare længe endnu. Men "velfœrden" er tœt på, og alt, hvad der er oprindeligt og enfoldigt, er blødt som børnespor i sand.

Multi(etnos) og demos

Men er alt sum hevur við tjóðina at gera so ein følsk myta meðni? Tað haldi eg ikki sjálvur. Eitt mark gongur millum anti-modernaðan tjóðskaparromantikk og eina modernaða, proaktiva fatan av heimstaðnum/tjóðini í globaliseringini. Tjóðin er ikki tann savnandi megin, hon hevur verið. Nógvastaðni er tjóðin vorðin multietnisk og fleirmentað, men hon hevur varðveitt sjálvsfatanina av at vera ein tjóð. USA er besta dømi. Tjóðin virkar sostatt framhaldandi sum ein felags heimstaður við felags máli. Í staðin fyri tjóðskaparromantikk er tørvur á sterkum blandingum millum *(multi)etnos* og *demos*, millum har vit koma frá (heimstaður, familja, søga) og hagar vit eru á veg (nýggir sjónarringar, karriera), millum tað fólksliga og tað intellektuella, millum kosmopolittin og tann heimstaðarbundna, sum tá samanum kemur er eitt sínámillum samband millum gamalt og nýtt. Tá Haarder - sum nevnt í fyrra parti - tvíheldur um danskleika er talan um ein útihýsandi eintalsetnos, sum er eitt monokulturelt gyklaverk í einum fjølmentaðum samfelag sum tí danska.

Hinvegin eiga humanisma og upplýsingarhugmál ikki at forða fyri kensluni av at hoyra til. Kritiskt tilvitaða upplýsingin eigur eisini at rúma ikki-skilbornum longsli. Fráleikakendi og atfinningarsami moderniteturin kann tykjast kaldur, men er eisini ein nýggjur og frœlsur karmur um varandi - amodernað - virði. Moderniteturin er tískil ikki ósambœrligur við ektaðan uppruna, sum vit kunnu kalla tað arke-menniskjaliga. Ektaður uppruni og tœr kenslur, sum loða uppi við honum eru meira enn pseudomytiskt tjóðskaparromantiskt hugflog um uppruna og kalla tískil djúpari. Av tí sama kann ein sum føroyingur heldur ikki heilt sleppa hugmyndini um sítt fyrsta tungumál: "Vi ere bundet til Modersmaalet med en Lœnke, der er let at bœre og tung at bryde," sigur Søren Kierkegaard.

Sterka rørslan millum tað givna og tað skapta

Sterkar blandingar sum hesar eru í roynd og veru runnar úr einari sannkenning av, at lívið hjá (modernaða) menniskjanum er ein rørsla millum tvœr grundleggjandi dimensiónir: uppdagað/givið lív og uppfunnið/skapt lív. Í leiðarorðunum til fyrra part av hesari grein tolkar Villy Sørensen filosofiska spurdómin kring *givið* og *skapt* sum eitt bœði- og. Hetta kann takast sum ein undirstriking av dialektikkinum millum menniskjað sum ein partur av einum sosialum og søguligum samanhangi og sum einstaklingur. Endamálið við upplýsing og moderniteti er ikki sum tjóðskaparromantikarar tykjast at halda fremmandagerandi abstraktiónir og einstaklingar avbyrgdir frá vanligum lívi. Moderniteturin er ein møguleiki, eitt amboð sum skal brúkast og gerast konkret av brúkarunum. Verður hann boðin innum, fœr hann eitt menniskjaligt andlit, og verður hann ikki, kenna vit hann bert sum fremmandan og rœðandi labyrintir og teknikk.

Einstaklingurin skal fatast og engagerað seg sosialt og søguligt. So religiøst og idealistiskt tað enn ljóðar: einstaklingurin skal fáa eitt kall, skal hann. Verðin er sum verð William Heinesens: hon er full av verðsligum kallum. Hoyra vit tey?

Kompleksa samfelagið

Kompleksa samfelagið er og skal vera meira enn sterkar blandingar og tølandi kall. Og fyri alt tað ber ikki til at bryggja sterkar blandingar uttan, at tað sum verður blandað er til hvør sær áðrenn blandingina. Hardcore ástøði og fólksligt felagslív liva og skulu liva hvør sítt lív. Hesi kunnu ikki blandast bara soleiðis, men eru tó partar av sama heimi og harvið ikki absolutt ymisk. Samtala er møguleg.

Tann besta blandingin er upplýsing og dannilsi. Øll hava brúk fyri dannilsi og at vera uppald, segði Kant. Endamálið við útbúgving eigur at vera at fáa - sum Platon segði - at fáa hug til at gera tað man skal. Og so kann ein byrja at kjakast um, hvørjir førleikar eru týdningarmestir í kompleksa føroyska samfelagnum, og hvussu innari radarskíggin á uppvaksandi œttarliðnum skal siggja út.



Tann felagsmentan í fjølmentaðum og øllum framkomnum samfeløgum strembast skal eftir eigur fyrst og fremst byggja á aðalin í fólkinum. Hesin aðal kann myndast við mildu humanismuni, William Heinesen av mongum at nevna fann í sagnfigurinum Guttormi í Múla